# Mamy er nú forkvinna

FAKFELAG
*Tíðndaskriv*

Almanna- og Heilsurøktarafelagið hevði aðalfund hósdagin í farnu viku.

Á fundinum varð nýggj nevnd vald, og tey, ið nú sita í nevndini eru:

Mamy Dahl Sørensen, sum er forkvinna

Sigrun Høgnesen, sum er næstforkvinna

Hinar í nevndini eru Elisabeth M. Hentze, Marita Sivertsen og Meta C. Palle.



*Mamy Dahl Sørensen varð, hósdagin í farnu viku, vald til forkvinnu á aðalfundinum hjá Almanna- og Heilsurøktarafelagnum*

# Áhugaverd list í Ribarhúsi

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Mánakvøldið 3. juni kl. 19.00 sýna trý donsk listafólk, Anette Arlett, Em Hess og Michael Arlett list fram í Riberhúsi. Tey eru úr listabólkinum 7-9-13 frá Falster.

Bólkurin er kendur fyri síni arbeiði í natúrini, t. d. hava listafólkini gjørt stórar hugmyndir , sum bóru heitið: »Ein skógarnátt« – ein nátt í tónleiki, standmyndum og framførslu í sjónleiki í einari skóg á Falster. Ein stuttfilmur frá hesi skógarnátt verður sýndur, tá ið framsýningin letur upp.

Em Hess er myndlistamálari. Myndir hennara eru úr natúrini og boða frá einfaldum natúrligum skapum og kvirru. Em Hess er útbúgvin á kunstakademinum í Aarhus og er eisini við í listabólkinum Lux.

Anette og Michael Arlett eru gullsmiðir og myndahøggarar - eru sjálvlærd og útbúgvin á Institut for Ædelmetal í Keypmannahavn. Tilfarið, tey brúka, er: flint og bronsa, træ, burturkast, steinur og Borneo rav. Skartgripirnir, sum tey gera, eru merktir av teirra hond og eru smá listaverk, sum tú kanst hava sum háls- og armprýði og sum fingurring. Tey hava stillað út í Norðurlondum, Týsklandi, Australia og Malaysia.

Framsýningin er frá mánadegnum 3. juni til og við fríggjadagin 7. juni hvønn dag frá kl. 15.00 til kl. 17.30.



*Savnsmynd*

# Gera forkanningar til Norðoyatunnilin

**P/F Norðoyatunnilin fer nú undir forkanningar í sambandi við fyrireiking av arbeiðinum at gera tunnil undir Leirvíksfjørð**

NORÐOYATUNNILIN
*Tíðindaskriv*

Sum framhald av seismisku kanningunum og kjarnuboringunum, ið vórðu gjørdar í fjør summar og seinasta heyst av Landsverkfrøðinginum, fer P/F Norðoyatunnilin nú undir at gera seismiskar kanningar í Leirvíksfirði. Síðani anlegslógin um fast samband um Leirvíksfjørð var samtykt, hevur verið arbeitt við at gera forprojekt fyri tunnil og atkomuvegir.

Kanningarnar, sum nú verður farið undir, hava til endamál at eftirkanna um jarðfrøðisligu viðurskiftini eftir ætlaðu linjuni eru nøktandi. Samstundis geva kanningarnar grundarlag fyri smærri tillagingum av linjuni, skuldi hetta víst seg at verið neyðugt.

Kanningarnar verða framdar av norska felagnum Geomap og fara tilsamans at fevna um eitt strekki uppá umleið 2,5 km. Kanningarna fara fram á strekkinum millum Hagaleiti sunnan fyri Leirvík og Brúnaskarð á Borðoynni.

Geomap er farið undir kanningarnar, sum koma at taka einar tvær vikur. Kanningarúrslitini verða væntandi tøk seinast í juli mánaða, sigur Dávid Reinert Hansen, sum er stjóri í P/F Norðoyatunnlinum.

# Stillassir úr aluminium

ARBEIÐSAMBOÐ
*Tíðindaskriv*

Nú fáast vælumtóktu stillassirnar frá Jumbo til keyps í Føroyum. Stillassirnar eru úr aluminium, og eru tær tí sera lættar at arbeiða við. Tað tekur bert fáar minuttir at seta upp til ein heilan húsavegg.

Tað er p/f Svend krosstein í Havn, sum hevur fingið umboð upp á Jumbovørurnar í Føroyum. Vøruúrvalið umfatar øll sløg av stillassum, bæði til breiðar og smalar, til innan- og uttandura, stillassir at folda saman, el-spøl at montera á stillassirnar, slagfastar amboðskassar, rættiskinnarar, bukkar í ymsum støddum, trygdarhegn su skjótt kann setast upp á betongklossar, plátulyftarar, gelendarar, aluminumsstigar í øllum støddum og el-drivnar lyftir sum røkkar 16-32 metrar. Lyftirnar hava hjól og eru lættar at slepa, um tú hevur sleipikrók á bilinum.

Leveringstíðin er stutt, og prísirnir eru sera sámuligir.

Sí annars lýsing í blaðnum í dag.



*Pola Mohr Poulsen, málarameistari í Havn hevur ognað sær eina Jumbostillas frá Svend Krosstein. Pole er sera væl nøgdur við stillassina, og hann sigur, at hon er sera løtt og góð at arbeiða við*

Sosialurin

Lesið Sosialin – tað loysir seg



# Bústevnan í Runavík enn einaferð útsett

**Óvist er, nær stevnan verður.
Tað skulu stigtakararnir nú finna út av saman við teimum, sum ætlaðu at verða við á stevnuni, Hús og Innbúgv.
– Fleiri og fleiri avboð komu, so hvørt tað leið út. Tí avgjørdu vit ikki at avlýsa, men at útseta stevnuna einaferð aftrat, sigur Hans Petur Ellingsgaard, annar av stigtakarunum.**

HÚS OG INNBÚGV
*Vilmund Jacobsen*

Sjálvt um tiltakið er gott og tiltalandi, er ikki altíð, tað gongur eftir vild. Soleiðis er við bústevnuni, Hús og Innbúgv, sum ætlandi skuldi verða í Ítróttarhøllini í Runavík.

Nú er stevnan, sum seinast varð ætlað at verða 7., 8. og 9. juni, enn einaferð útsett, og í løtuni er óvist, nær hon verður. Greitt er í øllum førum, at hon verður ikki hesumegin heystið, tí so nógv er útliðið. Fleiri og fleiri avboð eru komin, tí fólk hava onnur ting at takast við – ikki minst handverkararnir, sum skuldu verða við á stevnuni.

Teir, sum eiga hugskotið til bústevnuna og stóðu sum fyrireikarar, Hans Petur Ellingsgaard í Saltangará og Niclas Heri Jákupsson í Klaksvík, fara nú at tosa við tey, ið skuldu verða við og saman við teimum finna út av, nær stevnan skal verða.

– Spurningurin er nú, nær besta tíðin er - um tað er um heystið ella um várið. Tað fara vit at tosa við framsýnararnar um, og síðan verða stevnudagarnir ásettir av nýggjum, sigur Hans Petur Ellingsgaard.

**Málið var 50 framsýnarar**

Upprunaliga var ætlanin at hava bústevnuna síðst í apríl, men løgtingsvalið, sum var 30. apríl, órógvaði fyrireikingarnar. Síðan varð avgjørt at hava stevnuna dagarnar, 7., 8. Og 9. juni, men av tí, at fleiri avboð eru komin, tí so nógv er útliðið, avgjørdu stigtakararnir at útseta – men ikki avlýsa – stevnuna enn einaferð.

Hans Petur Ellingsgaard sigur, at teir upprunaliga settu nøsina upp ímóti at hava 50 framsýnarar á bústevnuni.

– Vit høvdu einar 40 tilmeldingar síðst í apríl, men tá ið stevnan fyrstu ferð varð útsett, fingu vit nøkur avboð og so hvørt, sum summarið er farið at nærkast, eru avboðini vorðin fleiri og fleiri.

Hann vísir á, at nú vóru bert einir 20 framsýnarar eftir, og tað mettu teir vera ov lítið, tí við so fáum luttakarum, hevði stevnan mist ein stóran part av sínum upprunaliga týdningi.

– Men tað er ikki vantandi áhugi frá luttakarunum, sum er orsøkin til hesi avboð. Orsøkin er, at ov nógv er liðið út á árið – veðrið er betri og dagarnir langir, og tí hava eitt nú handverkararnir rættiliga nógv um at vera, sigur Hans Petur.



*Hans Petur Ellingsgaard ivast ikki í, at bústevnan, Hús og Innbúgv, er eitt gott hugskot, tí stórur áhugi hevur verið millum fólk um, nær stevnan verður - ikki bara her heima, men eisini uttanlands*
*– Tí er stórt spell, at tað ikki gekst, sum vit ætlaðu, men nú fara vit saman við framsýnarunum at seta út í kortið av nýggjum, sigur stigtakarin í Saltangará*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Stórur áhugi**

Stigtakarin í Saltangará ivast tó ikki í, at bústevnan, Hús og Innbúgv, er eitt gott hugskot, tí stórur áhugi hevur verið millum fólk um, nær stevnan verður.

Hann sigur, at fleiri hava vent sær til teirra og spurt, hvussu verður við stevnuni.

– Hetta eru fólk, sum ætla sær at byggja, broyta ella umvæla húsini og fólk yvirhøvur, sum hava áhuga fyri hesum økinum, og tey eru mong, sigur Hans Petur.

Hann vísir á, at hóast teir slett ikki hava kunnað um stevnuna uttanlands, so hevur onkur útlendsk fyritøka ligið fram við og viljað verið við á stevuni. Somuleiðis hava útlendingar ætlað at vitjað sum áskoðarar fyri at síggja, hvat vit hava her heima í Føroyum.

Hans Petur ásannar, at ætlaða bústevnan hevur fingið nógva umrøðu millum fólk, og tað er besta tekin um, at hugskotið er gott.

– Tí er tað stórt spell, at tað ikki gekst, sum vit ætlaðu, men bústevnan er ikki avlýst, og tá ið vit hava tosað við framsýnararnar, verður sett út í kortið av nýggjum, nær stevnan verður, sigur Hans Petur Ellingsgaard.

# Kassamiðstøðin keypir 6.000 kør úr Íslandi

**– Hetta er okkara størsta bílegging av fiskakørum til ein einstakan keypara yvir eitt ár, sigur sølu-og marknaðarstjórin á Sæplasti í Dalvík.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Úr Íslandi frættist, at plastfyritøkan, Sæplast í Dalvík, er sera fegin um stóru bíleggingina hjá Kassamiðstøðini í Føroyum. Henda bílegging fevnir um tilsamans 6.000 fiskakør, sum hvørt er uppá 460 litrar.

Tey 6.000 kørini kosta meira enn 100 milj. íslendskar krónur. Í okkara peningi skal hetta tal býtast við umleið 9.

– Hetta er størsta bílegging av fiskakørum, sum Sæplast hevur havt til ein einstakan keypara yvir eitt ár, sigur sølu-og marknaðarstjórin á Sæplasti, sum fegnast um, at føroyingar seta stórt álit á íslendsku kørini.

**Smærri kør**

Víst verður á, at Kassamiðstøðin á Toftum, sum fiskivinnan í Føroyum eigur, keypir kørini úr Íslandi og leigar tey til skip og virkir í Føroyum. Fyritøkan hevur verið í stórum vøkstri seinastu árini.

Kassamiðstøðin hevur havt kør frá Sæplasti, sum eru 660 litrar og 1000 litrar, og teir hava verið væl nøgdir við hesi. Men eins og fiskivinnan í Íslandi er farin at nýta smærri kør seinastu árini, leggur fiskivinnan í Føroyum seg nú eisini eftir at skifta stóru íløtini út við tey smærru, nevniliga hesi 460 litur kørini.

Sølu-og marknaðarstjórin á Sæplasti í Dalvík dylur ikki, at tey eru sera fegin um samstarvið við Kassamiðstøðina á Toftum.



*Íslendingar eru sera fegnir um samstarvið við Kassamiðstøðina á Toftum, sum hevur havt størstu einstaku bíleggingina av fiskakørum hjá Sæplasti í Dalvík*

# Spæla hockey á nýggja asfaltinum

BØRN OG SPÆL
*Vilmund Jacobsen*

Nakað herfyri spældu eini 20-30 børn hockey hvørt einasta kvøld á júst asfaltteraða økinum norðanfyri virkið hjá P/F Snodd á Toftum.

Børnini stuttleikaðu sær óført, og tey vóru sein aftur til húsa hvørt kvøld. Hetta vóru børn í fleiri aldursbólkum, bæði gentur og dreingir úr 10 árum uppí eini 14 ella so.

Tey trivust ógvuliga væl í góðveðrinum hesi kvøldini, hóast onkur fekk eitt lítið skursl her ella har – og kanska skrædnaðu knøini í onkrum buksum eisini!

Hetta kvøldið, Sosialurin steðgaði á, vóru børnini ikki so mong í tali, men eisini tá stuttleikaðu tey sær óført.

Sum kvøldini gingu, fækkaðust børnini, tí okkurt kvøldið regnaði nakað illa, og tá var uppmøtingarhugurin ikki so góður.

Hópur av børnum hava keypt sær hockey-stavar í Leikabúðini í Saltangará. Tveir stavar eru í hvørjum posa, og teir bíligaru kosta minni enn 50 krónur. So, hetta er ein lítil íløga. Tey, ið hava keypt stavar, lána í onkrum føri einum vinmanni ella vinkonu tann, tey ikki brúka.

Lítið man vera at ivast í, at hesi vælumtóktu hockeykvøldini á nýggja asfaltinum á Toftum fara at halda fram, tá ið veðrið aftur er til vildar.



*Hetta man vera tað, vit kunnu kalla asfalthockey og ikki icehockey, sum vit plaga at síggja í sjónvarpinum. Líkamikið; børnini stuttleika sær óført á nýggja asfaltinum norðanfyri bygningin hjá P/F Snodd á Toftum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*